## UTTAN ÚR HEIMI

# Vil tosa um Kekenia

Líkt er til, at russiski forsetin, Vladimir Putin, ætlar at sissa tey mongu, sum hava funnist at russisku framferðini í Kekenia.

Tá Putin kom á almenna vitjan í Týsklandi mánadagin, segði hann, at hann er sinnaður at tosa við onnur um, hvussu kreppan í Kekenia kann loysast. Putin segði, at hann hevði fingið eitt uppskot, sum millum annað ber í sær, at Týskland og ES skulu virka við til at loysa kreppuna í Kekenia. -Hesum uppskotinum kunnu vit taka undir við uttan fyrivarni, segði russiski forsetin.

Týskir embætismenn søgdu, at Putin sipaði til eitt uppskot, sum ein týsk sendinevnd hevði við sær til Moskva í november. Sambært embætismonnunum er ES sinnað at spæla ein týðandi leiklut í arbeiðinum at fáa frið í Kekenia, og samveldið skal hava lovað russum fíggjarligan stuðul til økið í Kaukasus-fjøllunum.

Vitjanin hjá Putin í Týsklandi endaði í gjárkvøldið. Í Berlin hitti hann Gerhard Schrøder, kanslara, og teir tosaðu millum annað um forsetavalið í Ukraina. Sambært týskum talsmonnum lovaðu báðir leiðararnir at virða úrslitið av umvalinum, sum verður annan jóladag.

### Taka lívið av sær

32 av teimum monnunum, sum bretska løgreglan hevur tikið í sambandi við barnaporno, hava valt at taka lívið av sær.

Blaðið Daily Mail skrivar, at nógvir av teimum 32 monnunum høvdu konu og børn, og at teir kundu rokna við at gerast arbeiðsleysir, vórðu treir dømdir sekir. Hetta stóra sálarliga trýstið toldu teir ikki og valdu tí heldur at gera enda á sær, skrivar blaðið.

Teir 32 bretsku menninir vóru ímillum fleiri túsund, sum vórðu tikin undir einum stórum átaki ímóti barnaporno fyri tveimum árum síðani. Í Bretlandi hevur løgreglan skrásett 7.200 fólk, sum hava havt samband við barnapornografiskt tilfar. Av teimum eru umleið 1.600 ákærd, og 1.200 hava longu fingið dóm.

# Ov stóran skund

Fíggjarmálaráðharrin í Slovakia, Pavol Rusko, hevði dekan ov stóran skund, tá hann nú um dagarnar var í grannalandinum Eysturríki. Á motorvegnum nærhendis býnum Linz staðfesti ein ferðmátari hjá løgregluni, at ráðharrin koyrdi 220 kilometrar um tíman, sjálvt um mest loyvda ferðin har er 130 kilometrar um tíman.

Tann 41 ára gamli ráðharrin fekk góðar 5.000 krónur í bót, men hann hevur fingið at vita, at hann møguliga fær størri bót seinni. Ein onnur avleiðing verður kanska, at hann fær forboð fyri at koyra bil í Eysturríki, skrivar Reuters.

Tilbúðurin er sera óheppin fyri Slovakia, í Pavol Rusku er ikki bara fíggjarmálaráðharri, men eisini varaforsætisráðharri.

# Gamal maður

Fornfrøðingar í Sameindu Arabisku Emiratunum hava funnið beinagrindina av einum manni.

Teir halda at beinagrindin er av einum manni, sum hevur verið ímillum 20 og 40, tá hann doyði fyri umleið 7.500 árum síðani. Er hendan metingin røtt, er hetta elsta beinagrindin av fólki, sum er funnin á hesum leiðum. Fornfrøðingarnir komu fram á beinagrindina í einari fornaldarbygd á oynni Marawah stutt frá strondini í Sameindu Arabisku Emiratunum.

Umframt beinagrindina funnu fornfrøðingarnir eitt spjót og ein ørv úr flintsteini umframt ymisk amboð. Teir halda, at amboðini stava úr gamla Mesopotamia, sum nú er Irak.



*Viðhaldsfólk hjá Viktor Jusjtjenko fylgdu valdystinum á stórskíggja*

# Harður valdystur

**Sjónvarpsdysturin mánakvøldið ímillum tey bæði ukrainsku forsetavalevnini var harður, og partarnir løgdu ikki fingrarnar ímillum**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Valstríðið upp undir forsetavalið í Ukraina annan jóladag kom í hæddina mánakvøldið, tá tey bæði valevnini, Viktor Janukovitj og Viktor Jusjtjenko, dystaðust í almenna sjónvarpinum.

Jusjtjenko var serliga ágangandi og legði mótstøðumannin undir at hava stolið tríggjar milliónir atkvøður frá sær á forsetavalinum tann 21. november.

– Tygum eru ein trúgvandi maður, so tygum kenna boðið um, at ein skal ikki stjala. Kortini stjólu tygum tríggjar milliónir atkvøður. Men tygum vilja kanska vera við, at tað er hægstirættur, sum lýgur, og at tað eru tygum, sum siga sanleikan, segði Jusjtjenko.

Viktur Janukovitj svaraði við at leggja andstøðuna undir at hava framt kvett í Ukraina, tí hon vildi ikki viðurkenna úrslitið av valinum 21. november, og hann nýtti høvi at minna Jusjtjenko á, at har eysturi í landinum vilja fólk vilja fólk ikki vita av honum.

– Tygum halda, at tygum fara at vinna, og at tygum verða forseti í Ukraina. Men tygum mistaka tygum, tí tygum verða bara forseti í einum parti av landinum, segði Janukovitj.

Jusjtjenko svaraði við at eggja ukrainum at standa saman, og hann lovaði, at sum forseti fer hann at varðveita góð viðurskifti við Russland. Kortini legði hann dent á, at tann gamla tíðin er farin.

– Higartil hevur Moskva gjørt av, hvør skal vera forseti í Ukraina, men nú skulu ukrainar sjálvir taka avgerðina, segði Viktor Jusjtjenko.

# Blair vil ikki slaka

**Bretski forsætisráðharrin sýtir fyri at fylgja einari støðutakan hjá hægstarætti um fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgang. Ístaðin fyri skal lógin broytast eitt sindur**

LÓGGÁVA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hægstirættur í Bretlandi hevur staðfest, at partar av teirri serligu yvirgangslógini eru í stríð við altjóða reglur. Serliga vísti rætturin á, at tann lógargreinin, sum heimilar myndugleikunum at varðhaldsfongsla útlendingar í óásetta tíð, stríðir ímóti altjóða reglunum um mannarættindi.

Men Tony Blair, forsætisráðhari, vil ikki slaka. Fyrradagin segði hann í Undirhúsinum, at hann kennir seg noyddan at hugsa um trygdina hjá bretska fólkinum fyrst. Hann lovaði, at stjórnin fer at broyta lógina, men at tey, sum eru varðhaldsfongslað sambært yvirgangslógini, verða ikki latin leys.

Síðani lógin kom í gildi í fjør, hava bretsku myndugleikarnir sett 17 útlendingar í varðhald, tí illgruni er um, at teir hava tilknýti til yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda. Ellivu teirra sita framvegis í varðhaldi, men enn hava myndugleikarnir ikki prógvað, at teir hava gjørt nakað ólógligt, skrivar Reuters.